**Bárður S. Nielsen**
**Edmund Joensen**
**Kaj Leo Holm Johannesen**
**Magnus Rasmussen**
**Bjørn Kalsø**
**tingmenn**
**vegna Sambandsflokkin**

**Løgtingið**

**Løgtingsmál nr. 51/2018: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um val til Løgtingið og løgtingslóg um val til allar føroyskar kommunur**

## Uppskot til

## løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um val til Løgtingið og løgtingslóg um val til allar føroyskar kommunur

### § 1

Í løgtingslóg nr. 49 frá 20. juli 1978, um val til Løgtingið, sum seinast broytt við kunngerð nr. 69 frá 28. mai 2013, verður henda broyting gjørd:

Í § 28 verður aftaná stk. 1, sum nýtt stk. sett:

"*Stk. 2.* Um valstaðið hevur færri enn 200 veljarar, verða atkvøðukassarnir fluttir til annað valstað og atkvøðurnar verða taldar saman við atkvøðum á tí valstaðnum. Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um, hvørji valstøð verða tald saman."

Stk. 2 - 4 verða eftir hetta stk. 3 - 5.

### § 2

Í løgtingslóg nr. 44 frá 19. juni 1972 um val til allar føroyskar kommunur, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 97 frá 15. november 2006, verður henda broyting gjørd:

Í § 17 stk. 2 verður aftan á 1. pkt. sum nýtt pkt. sett:
"Um færri enn 200 veljarar eru á einum valstaði í kommunu, sum samanlagt hevur fleiri enn 200 veljarar, men sum er býttar upp í tvey ella fleiri atkvøðuøki, verða atkvøðurnar á hesum valstaðnum taldar saman við øðrum valstaði ella valstøðum í kommununi, soleiðis at í minsta lagið 200 atkvøður verða taldar saman."

### § 3

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

**Almennar viðmerkingar**
Ein meginregla í løgtingslógunum um val til Løgtingið og val til allar føroyskar kommunur er, at valini skulu vera loyniligt. Millum annað verður sagt í lógunum, at atkvøðukassarnir skulu vera læstir, meðan atkvøðugreiðslan fer fram. Men av tí at summi valstøð hava sera fáar veljarar, ber í teimum førunum næstan til at seta navn á, hvør eigur hvørja atkvøðu. Dømi eru um fólk, sum ikki tora at atkvøða eftir síni bestu sannføring orsakað av hesum.

Í lógini um val til løgtingið er ásett, at einki valstað kann hava færri enn 10 veljarar (tað eru bara tríggir veljarar fleiri, enn tað eru flokkar í Løgtinginum). Hetta er ein sera óheppin støða fyri demokratiið á smáplássunum.

Tí verður skotið upp at til løgtingsval, og til kommunustýrisval, har fleiri enn 200 veljarar eru í kommununi, skal einki valstað við færri enn 200 veljarum teljast upp einsamalt.

**Serligar viðmerkingar**
Talan er um tvær lógarbroytingar.

Til § 1: Ein broyting er í løgtingslóg um val til Løgtingið, ið inniheldur, at um valstaðið hevur færri enn 200 veljarar, verða atkvøðukassarnir fluttir til annað valstað og atkvøðurnar verða taldar saman við atkvøðum á tí valstaðnum. Landsstýrismaðurin fær heimild til at áseta nærri reglur um, hvørji valstøð verða tald saman.

Til § 2: Hin broytingin er í løgtingslóg um val til allar føroyskar kommunur, ið inniheldur, at um færri enn 200 veljarar eru á einum valstaði í kommunu, sum samanlagt hevur fleiri enn 200 veljarar, men sum er býttar upp í tvey ella fleiri atkvøðuøki, verða atkvøðurnar á hesum valstaðnum taldar saman við øðrum valstaði ella valstøðum í kommununi, soleiðis at í minsta lagið 200 atkvøður verða taldar saman.

Til § 3: Gildiskomuáseting.

**Á Løgtingi 5. oktober 2018**

Bárður S. Nielsen — Edmund Joensen

Kaj Leo Holm Johannesen — Magnus Rasmussen

Bjørn Kalsø